# Kuta minst 50% av Sev rokningini

**STREYMPRÍSIR** Tað er onki fyri at spara minst helvtina av streymrokningi burtur, staðfestir borgarstjórin í Vestmanna

Áki Bertholdsen

- Tað ber væl til at spara minst 50% av Sev rokningini burtur.

Tað staðfestir Karl A. Olsen Borgarstjóri í Vestmanna.

Streymurin er nú blivin so dýrur, at hann er ein kleppur um hálsin á húskjum, kommunum, fyritøkum og virkjum, sum brúka nógvan streym.

Tí liggur stórt trýst á Sev um at byggja varandi orkukeldur út fyri at sleppa undan oljuni, sum nú er so dýr, at hon er við at forkoma Sev.

Men borgarstjórin í Vestmanna heldur, at ein góður máti at hjálpa Sev, er við at seta sparingar í verk ístaðin fyri at krevja fleiri útbyggingar.

Heldur enn at byggja út í stórum stíli, ber tað ístaðin til at spara streym.

- Tað hevði lætt munandi um trýstið á Sev um at byggja út fyri at sleppa undan oljuni og fyri at nøkta ein alsamt veksandi tørv.




## Niður í helvt

Og hann staðfestir, at kommunurnar brúka eini 10% av streyminum, sum Sev ger.

- Nógv tað mesta av oljunýtsluni fer til ljós av ymsum slagi.

Hann hugsar um gøtuljós, ljós á havnarløgum og ljós í kommunalum bygningum.

- Við lutfalsligum smáum íløgum ber til at spara minst helvtina av streymnýtsluni burtur, so at parturin hjá kommununum av framleiðsluni hjá Sev minkar niður í 5%.

Karl A. Olsen sigur, at hetta kann gerast við nýggjari tøkni og við nýggjum perum og øðrum tiltøkum, leggur hann afturat.

- Vit brúka alt ov nógva orku, tí vit hava gamla tøkni. Tað kann verða dýrt at leggja um til nýggja tøkni, men tað er ein íløga, sum sparir seg inn aftur upp á rættiliga stutta tíð.

- Í summum førum er sparingin so stór, at tað tekur bara mánaðir at spara íløguna inn aftur, heldur enn nøkur ár, leggur hann afturat.

aki@sosialurin.fo

**SPARING**

*- Tað er dýrt hjá Sev av byggja út, men vit kunnu sum onki seta sparingar í verk, sum føra við sær, at tað ikki verður neyðugt hjá Sev at byggja so nógv út, sigur borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen*

# Kommunurnar skulu hjálpa fólki at spara

**ORKUSPARING** Kommunurnar eiga sjálvar at bora hol til berghita ella at seta vindmyllur upp fyri at útvega borgarunum bíligari orku

Áki Bertholdsen

Kommunurnar kring landið eiga at útvega fólki bíliga orku, akkurát sum tær frammaundan útvega teimum reint vatn.

Tað heldur Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna.

Hann sigur, at Sev, sum kommunurnar eiga, er komið í dýrastu neyð av tí, at oljan er blivin so dýr.

Tað førdi til stóra príshækking á nýggjárinum og fer uttan iva at føra til enn fleiri príshækkingar í næstum.

Men borgarstjórin í Vestmanna staðfestir, at heldur enn at byggja út og kola olju upp hjá Sev, eiga vit at seta sparingar í verk fyri at minka um orkunýtsluna.

Í hesum sambandi heldur hann, at kommunurnar eiga at gera meiri við at útvega fólki bíliga orku.

- Kommunurnar eiga í størri mun at útvega borgarunum berghita og aðra varandi orku, heldur hann.

Hann vísir á, at Tórshavnar Kommuna hevur eina fjarhitaskipan og hann heldur, at hetta er ein leistur, sum fleiri kommunur eiga at taka til sín.

## Lættari

Hann sigur, at merkir borgarum eina sparing, tí hann fær minni brúk fyri olju, verður tað lættari at góðtaka, at prísurin á streymi hækkar.

- Vit brúka alt ov nógvan pening til olju at hita hús við, leggur hann afturat.

Karl A. Olsen sigur, at hetta verður ikki ein útreiðsla hjá kommununum, tí tær taka sjálvsagt gjald frá fólki fyri orkuna, soleiðis, at tað verður nóg mikið fyri íløguna og til at halda hana og endurnýggja hana fyri.

- Hetta er ein tænasta til borgaran, akkurát sum tað er ein tænasta at útvega teimum reint vatn, ein bátahyl ella ein barnagarð, heldur borgarstjórin í Vestmanna.

aki@sosialurin.fo

**50.000 krónur**

Vestmanna Kommuna er eitt gott dømi um, hvussu nógvan streym tað ber til at spara við at leggja um til nýggja tøkni og við øðrum íløgum.

Í Vestmanna hava tey gjørt nógv burtur úr at gera skúlan til ein grønan skúla og ein stórur partur av tí arbeiðnum hevur verið at seta tiltøk í verk fyri at spara streym.

Í hesum sambandi hava tey skift ljósini í skúlanum og á økinum rundan um skúlan og sett orkusparandi perur í.

Samstundis hava tey sett klokku á luftskifti, so at motorararnir ikki ganga alla tíðina.

Úrslitið av øllum hesum tiltøkum er, at bara skúlin í Vestmanna sparir góðar 50.000 krónur um árið í streymi.